# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Jobmatch - heim at byggja land

Í døgunum 26. og 27. september verður starvstevna á Norðurbryggjuni í Keypmannahavn. Tað er Bitland í samstarv við Tórshavnar kommunu og Samvit, ið fyriskipa tiltakið JobMatch, ið verður stuðlað av Føroya Banka, Tórshavnar kommunu og Vinnuframagrunninum.

Endamálið við stevnunu er at gera tað lættari hjá útisetum at koma í samband við føroyskar fyritøkur og stovnar. Á starvstevnuni verða viðkomandi framløgur um, hvussu ein skrivar og uppbyggir eitt CV og umsókn. Umframt hetta verður eisini greitt frá, hvussu starvssamrøður fara fram, og hvussu ein kann fyrireika seg til slíka. Harumframt fer Tórshavnar Kommuna (TK) at greiða frá praktiskum viðurskiftum, ein skal geva sær fær um, tá flutt verður heim aftur. Hartil fáa tær luttakandi fyritøkurnar/stovnarnir høvi til at siga nøkur orð um seg sjálvan.

Endamálið við framløgunum er at geva lesandi og útbúnum føroyingum høvi til at kunna seg um starvssøkjan og føroysk viðurskifti í sambandi við heimflytan. Harumframt fer TK at greiða frá praktisku viðurskiftunum, ein skal geva sær fær um, tá flutt verður heim aftur til Føroya og luttakandi fyritøkur og stovnar fáa høvi at lýsa seg sjálvan.

Ein vinnulívsmaður sigur í serblað okkara í gjár, at tað er eingin ivi um, at tað er stórur tørvur á einum tiltaki sum JobMatch. Vit fáa heilt einfalt ikki nokk fólk í Føroyum. Tá ein fyritøka ikki fær nokk fólk, er tað ein forðing í mun til menning og vøkstur. Samfelagið ger nógv fyri at tryggja føroyskum ungdómi góðar útbúgvingarmøguleikar. Orsøkirnar til, at vit royna at tryggja ungdómi okkara góðar útbúgvingarmøguleikar eru fleiri t.d. hetta, at tað er gott og gagnligt fyri fólk at hava eina útbúgving. Men hinvegin er heldur ikki yvir at dylja, at samfelagið hevur brúk fyri vælútbúgvnum fólki.

Ein fortreytin fyri støðugari samfelagsmenning er væl útbúgvið fólk. Í løtuni er hópin av føroyingum í holt við útbúgvingar av øllum sløgum. Hesar útbúgvingar koma í høvuðsheitunum einum øðrum landi til góðar umframt at tær eisini koma tí unga til góðar. Skulu Føroyar mennast til at vera millum fremstu lond á øllum samfelagsøkjum er tað avgjørd fortreyt, at størri partur av teimum, sum í dag eru undir útbúgving í útlandinum koma heimaftur. Men sum er eru nógvar forðingar fyri slíkari tilgongd. Tað er m.a. fyri at beina burtur nakrar av hesum forðingum at skipað verður fyri starvsstevnuni Jobmatch.

Hetta er eitt frálíkt tiltak og vit vóna, at útisetar taka væl undir við tiltakinum og at hetta tiltak fer at eggja landsmonnum- og kvinnum við útbúgving at koma heimaftur. Tað eru sjálvsagt nógv viðurskifti her heima, ið gera, at føroyingar við útbúgving ikki venda heimaftur. Sostatt er bert at ynskja tað besta fyri ráðstevnuna og tey ungu, ið vónandi fjølment fara at vitja oman á Norðurbryggjuna.

**Sosialurin**

## Til Samráðs

KÁRI Á RÓGVI



Løgtingsformaðurin, Hergeir Nielsen, ið eftir stýrisskipanarlógini er hægstur tign í Føroyum, bað okkum í morgun koma á fund at veita honum ráð, nú løgmaður hevði biðið um at sleppa úr embæti sínum.

Formaður okkara var og umboðaði Føroyar á sín virðiliga hátt í norðurlandaráðnum – sum varamaður hjá Kaj Leo Johannesen, ið onkursvegna ikki hevði stundir at røkja tað starvið. Tí fall á meg at umboða tingbólk Sjálvstýrisfloksins.

Fyrst var at gera løgtingsformanninum greitt, at Sjálvstýri ikki harmast fráfarandi løgmann. Hesin valdi at leggja kongin, tá ið Sjálvstýrisflokkurin kravdi kanningarstjóra at kanna embætisførslu hansara, serliga ta margháttligu lásagøluna. Hesa kanning fara vit tó at halda fast við og fara at tryggja okkum undirskrift frá neyðugu tveimum fimtingum av tingmanningini.

Oman á øll hini brotini hevur Jóannes Eidesgaard nú lopið um mannagongdina í Stýrisskipanini; tá ið hann legði kongin, átti hann straks at boða løgtingsformanninum frá, so rættar samráðingar kundu koma í lag, heldur enn at føra samráðingar í lívd av tí løgmansembæti, ið hann nú ikki vildi røkja longur.

Men hóast Sjálvstýrisflokkurin fegnast um, at løgmansskifti fæst í lag, so heldur flokkurin fast um stevnuskrá sína, at best var, at løgmaður var beinleiðis valdur. Eftir verandi stýrisskipan skal Løgtingið formliga velja løgmann, men í heyst hevði borið til at havt vegleiðandi fólkaatkvøðu, so seinna umfar fall saman við kommunuvalinum.

Fekk fólkið høvi at vísa á løgmann, so høvdu Føroyar loksins fingið veruligt landsstýri, ið hevði samskipað alt útinnandi vald við landsins besta fyri eyga. Seinastu árini við ABC er valdið bara býtt á skinninum, onkur flokkur fær fiskivinnu, annar fær mentan, onkur fær løgmanssessin, men ongin samskipan er ætlað, ongin samlaður politikkur verður førdur. Løgtingið er býtt í samgongu og andstøðu; samgongutingmenn atkvøða fyri øllum, sum landsstýrið vil, í vón um at sleppa í landsstýrið at sita ein vakran dag; og onki andstøðuuppskot fær nakra veruliga viðgerð.

Vit vístu eisini løgtingsformanninum á, at stórur sjálvstýrismeiriluti er á tingi. Sjálvstýrisflokkurin og teir flokkar, ið runnir eru av honum, telja stóra meirilutan og høvdu heilt vist vunnið løgmannsessin, um fólkið slapp at tala.

Tí varð mælt løgtingsformanninum sjálvum at royna seg sum samráðingarleiðara at kanna hesar møguleikar.

## Sum at rópa út í tóman heim

DAGNY JOENSEN



Vónandi verður nú loksins aftur friður á politiska víðvøllinum, og landsins kosnu kvinnur og menn sleppa til verka.

Tað verður vónandi eisini meira áhugavert at frætta tíðindi í føroyska sjónvarpinum. Eg noyðist at viðganga, at tað hevur verið forargiligt at vera áskoðari til lítið konstruktivt og ótrúliga einstáttaðar tíðindasedningar í seinastuni, tá vit skuldu frætta um orrustuna í Landsstýrinum og beinleiðis sending í tinginum, har formenninir fyri samgonguflokkarnar ein fyri og annar eftir, sum í sunnudagsskúla, skuldu standa framman fyri snurrandi upptøkutólunum og til svars fyri sjónvarpsvertinum undir seinastu samráðingunum. Har stóðu landsins floksformenn upp á skift og svaraðu einamest spurninginum, um teir vildu vera løgmenn?? Tað gjørdu teir alla síðstu viku og nú seinast við borðið í sjónvarpsstovuni mikukvøldið.

Eg noyðist at viðganga, at tað verður ófriðarligt heima í stovuni, tá verturin við borðið í sjónvarpsstovuni langar út til høgru og vinstru. Ikki bert tað: hann gevur ikki sínum "offrum" møguleika at svara. Tað tykist sum verða tey eins ørkymlað og áskoðarin og kennist so óvirðiligt fyri allar partar. Tað mest ólukkuliga er, at hvørki høvd ella hali verður í kjakinum við borðið, tá eingin samanhangur er í tí, sum tosað verður um.

Sjálvandi skal tað ganga kvikliga fyri seg, so vit heima í sofuni ikki skulu sovna, men tað kann ivaleyst eisini ganga skjótt, fyri tað um spurningarnir eru áhugaverdir og fólk fáa høvi at svara, áðrenn verturin sum ketta úr høvdatroð kvikar sær víðari til næsta spurning.

Eg haldi oftani, at tað er synd í teimum, sum verða boðin til hetta borðið. Tó er tað ikki tann kenslan tú fært tá politikarar verða spurdir. Tey hava sjálv bjóðað seg fram, og skuldu standa til svars fyri veljarum sínum. Tað er í lagi.

Hinvegin at nýta tíð og orku at senda beinleiðis frá samgongusamráðingunum og ikki hava annað at fregnast um, enn hvør vil vera løgmaður í eina heila viku? Tað er tíðarspill. Peningurin átti at verið betur nýttur í Kringvarpinum, sum átti at verið ein publicservice støð.

Nú er tað kanska ikki so einfalt at gera tíðindasending um hendingar, sum boytast frá einum tíma til annan, men hugsandi kundi tað verið stundir til at seta seg inn í ymsu málini í longu bíðitíðini sum er, tá politikarar fundast út í eitt í fleiri samdøgur.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Tróndur Skaalum trondur@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Dorit Hansen dorit@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.